



## Spírandi list í Smiðjuni

Enn eina ferð hevur Spírandi list listaframsýning niðri í Smiðuni í Lítlu Vík, har til ber at síggja eitt breitt og spennandi úrval av myndlist. - Øll eru hjartaliga vælkomin. Til ber at støkka inn í gólvið: fríggjadagin 19/3 og sunnudag 21/3 frá kl 14.00 til kl 18.00, leygardagin 20/3 frá kl 10.00 til 18.00, mánadagin 22/3 og týsdagin 23/3 er opið frá 15.00 til 18.00. Tey luttakandi í ár eru næmingarnir hjá Randi M. Gunnarsdóttir: Ann Mari Mouritsen, Durita Johansen, Evald Joensen, Inga Samuelsen, Kristina Lervig, Lisa Hendriksdóttir, Louisa Fjallsbak, Makonny Thomsen, Turid Kruse

# Vil hava landsstýrið at niðurleggja trý aðalráð

**- Ongin kreppa verður loyst við at knokkroyta skattaborgaran. Tvørtur ímóti eigur landsstýrið at ganga undan sum eitt gott fyridømi og byrja við at niðurleggja trý aðalráð, sigur Ingeborg Vinther**

BÚSKAPARKREPPA

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Fakfeløgini mugu ger alt fyri at steðga hesum ørskapinum, segði Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag á aðalfundinum í Føroya Arbeiðarafelag í morgun*

- Landsstýrið eigur at niðurleggja eini trý av teimum níggju aðalráðunum, sum nú eru, tá ið løgmansskrivstovan verður tald við.

Tað heldur Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag.

- Og harafturat eiga politikararnir eiga eisini at frásiga sær nakrar av skattafríu ágóðunum, teir hava, leggur hon afturat.

Føroya Arbeiðarafelag hevur ársaðalfund í dag og í ársfrágreiðing síni staðfestir forkvinnan, at hevði landsstýrið fyrst sópa fyri egnum durum, hevði skattgjaldarin sæð, at eisini tey fólkavaldu eru sinnað at spara hjá sær sjálvum.

Tí heldur hon, at ein gongd leið kundi verið at niðurlagt eini trý aðalráð.

- Almannamálaráðið og heilsumálaráðið eiga at verða løgd saman í eitt aðalráð, sigur hon í eini viðmerking.

Somuleiðis heldur hon, at fiskimálaráðið og vinnumálaráðið kundu verðið løgd saman, ella kundi innlendismálaráðið verðið lagt undir eitt annað ráð.

Men undir øllum umstøðum heldur hon, at uttanríkisráðið eigur at vera niðurlagt.

- Uttanríkisráðið er øgiliga dýrt, men eg dugi ikki at síggja, at tað ger nakra sum helst nyttu, sum ikki onkur annar kundi gjørt munandi bíligari, sigur Ingeborg Vinther.

### Tekin um óvilja

Hon heldur eisini, at tað er eitt tekin um óvilja, at løgtingið at kalla einmælt, atkvøður fyri, at politikarar skulu hava rætt til fleiri almennar lønir.

Hon sipar til, at tá ið landsstýrisfólk fara frá og taka sæti á Løgtingi, fáa tey bæði løn sum landsstýrisfólk í nakrar mánaðir, umframt lønina sum løgtingslimur. Hava tey alment starv, fáa tey so eina hálva løn afturat.

Ingeborg Vinther fýlist á, at løgtingslimir vildu ikki frásiga sær hendan framíhjárætt, tá ið málið varð til viðgerðar í farnu viku.

- Og har vóru samgonga og tað mesta av andstøðuni so rørandi samd, sigur hon.

- Høvdu politikararnir gingið á odda og framt sparingar hjá sær sjálvum, hevði tað verið munandi lættari hjá teimum at fingið aðrar bólkar til eisini at vísa samfelagssinni, sigur hon.

### Gera alt ov lítið

Men hon væntar ikki, at tað fer at henda, at politikarar vilja ganga undan sum góð fyridømi.

Tvørtur ímóti fýlist hon á, at samgongan ger alt ov lítið fyri at loysa búskaparligu trupullekarnar.

- Vit skuldu hildið, at løgtingið var upptikið av hesum álvarsmáli og royndi at finna loysnir til tess at bøta um fíggjarkreppuna.

- Men tað, ið vit hoyra, er, at løgtingslimir hvør í sínum lagi virka í sjálvdrátti, tað veri seg í samgongu ella andstøðu, har hvør roynir í sínum lagi at gera vart við seg sjálvan og síni sjónarmið.

### Knokkroyta skattgjaldaran

Hon vísir eisini á ætlanina hjá landsstýrismanninum í fíggjarmálum at breiðka skattagrundarlagið.

- Tað merkir, at fleiri avgjøld skulu leggjast á fólkið, grønt avgjald, dýrari bensin og olja.

Harafturat hava Búskaparráðið og landsbankastjórin mælt til ognarskatt.

Men Ingeborg Vinther staðfestir, at eingin kreppa verður loyst við at knokkroyta skattgjaldaran meira.

Serliga leggur hon dent á, at ognarskattur má koma upp á tal.

- Vit skulu minnast til, at í Føroyum má hvør einstakur byggja síni egnu hús. Øll gjalda skatt av tí pengi, tey gjalda síni húsalán við. Toll og meirvirðisgjald hava tey eisini goldið av hesum.

Sostatt hava øll goldið til landshúsarhaldið av hvørjari krónu, tey hava brúkt til at fáa tak yvir høvdið við.

- Og tey flestu stríðast við at fáa goldið síni hús, áðrenn tey koma til pensjónsaldur og tað er heilt burturvið, at tey so harafturat fara at gjalda ognarskatt av sínum húsum.

Hon staðfestir, at fakfeløgini mugu gera alt fyri at steðga hesum ørskapi sum skjótast.

- Eingin búskaparkreppa verður loyst við at taka hugin frá fólki at arbeiða, tí tey verða frammanundan díkt undir í skatti og avgjøldum, ei heldur við at fara við spariknívinum eftir teimum veiku og verjuleysu, sigur forkvinnan í Føroya Arbeiðarafelag.